| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**26. mai 2008** | Blað nr.:<br>7401<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **26. mai 2008** **kl. 20.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 94/08-112/08**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir
Elin Lindenskov
Bjarti Mohr
Halla Samuelsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Annfinn Brekkstein
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Høgni Mikkelsen

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, KL.20.00**

**95/08** **2008-0262/4 SG**

**Høgni Mikkelsen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Annfinn Brekkstein, eru loknar.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt.

**96/08** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 26. mai 2008:** Tikið til eftirtektar.

**97/08** **2008-0205 MD**

**Umsókn frá Dávur Petursson Jacobsen um at avlýsa servituttir á matr. nr. 1098g**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Dávur Petursson Jacobsen hevur við umsókn, dagfest 18. januar 2008, biðið um at fáa avlýst servitutt á ognini matr.nr. 1098g, soleiðis at loyvi kann verða fingið at byggja tvíhús á ognina.

Við umsókn, dagfest 30. januar 2008, hevur Dávur Petursson Jacobsen biðið um at fáa avlýst allar servituttir á matr.nr. 1098g, soleiðis at byggjast kann eftir galdandi byggisamtykt fyri økið (vanligu ásetingarnar fyri A1 øki).

Býarskipanarreglur samtyktar í býráðnum tann 24. februar 1972 eru lýstar á ognina tann 28. februar 1972.

Sambært § 4 í býarskipanarreglunum er tað bert loyvt at byggja vanlig sethús við hartil hoyrandi úthúsum og bilskúrum á ognina.

Sambært tinglýsta servituttinum hevur Tórshavnar býráð átalurætt.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til, at fíggjarnevndin beinir málið til ummælis í viðkomandi faknevnd/um.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini um strikan av servituttum á møti, vísandi til at ognin er í eini skipaðari útstykking, har ikki er hóskandi vegbreidd til tvíhús.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**98/08** **<u>2008-0882 KF</u>**

**Umsókn frá Poul Hansen, adv, um broytan av byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 692, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tann 15. desember 2005 samtykti býráðið at selja áleið 1320 m$^2$ av matr. nr. 692 við Eysturskúlan til Sámal og Hanus á Krákusteini.

Av ymiskum orsøkum er góðkenningin av søluni ikki komin fyrr enn 28. februar 2008.

Økið er partur av lendinum, sum var ognartikið, í sambandi við bygging av Eysturskúlanum og er útlagt sum D3-øki í almennu byggisamtyktini og C2 í serstøku byggisamtykt nr. 7.

Áðrenn Matrikulstovan kann frábýta selda økið til samanleggingar við økið hjá Hanus og Sámal á Krákusteini, má byggisamtyktin broytast til sethúsaøki.

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur góðkent útstykkingarætlanina á fundi 4. september 2006.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at almenna byggisamtyktin verður broytt frá D3 til A1 og serstaka byggisamtykt nr. 7 verður broytt samsvarandi frá C2 til til A2 sambært korti dagf. 17. april 2008.

Umboð fyri løgdeildina koma á fundin at greiða frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**99/08** **<u>2008-0025 LA</u>**

**<u>Broyting av byggisamtykt fyri Kirkjubø/ Velbastað.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur.**
Í sambandi við, at umsókn er komin um byggiloyvi til serliga stórt bilhús í Kirkjubø, er staðfest, at ongar ásetingar eru um bilhús í galdandi byggisamtykt fyri Kirkjubø/ Velbastað.

Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er mesta vídd 50 fermetrar. Harumframt hevur tað ávirkan ástøddina á sethúsinum um víddin er yvir 35 fermetrar.

Vísandi til siðvenju, kann aktuella málið í Kirkjubø útsetast, meðan arbeitt verður við broyting av byggisamtyktini.

Eftir tilmæli frá Bárði Larsen, ráðgeva, verður við hesum heitt á byggi- og býarskipanarnevndina um at broyta galdandi byggisamtykt fyri Kirkjubø/ Velbastað soleiðis, at har ivamál eru, verða ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi. Harumframt verður mælt til, at aðrar smávegis broytingar verða framdar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta galdandi byggisamtykt fyri Kirkjubø/ Velbastað soleiðis, at har ivamál eru, verða ásetingarnar í almennu

byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi. Harumframt verður mælt til, at aðrar smávegis broytingar verða framdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. februar 2008:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Orsøkin til, at málið varð tikið av skrá til býráðsfundin 28. februar 2008, var tí ivamál hevði tikið seg upp, um Kirkjubøar kommuna broytti sína byggisamtykt í 2004, beint fyri kommunusamanleggingina. Hetta er nú kannað av umsitingini, og tað vísir seg, at einans umráðispartar eru broyttir í kortskipaninni, men ikki byggisamtyktin sjálv.
Eisini verður mælt til at "formuleringin" í setninginum: *"Harumframt verður mælt til, at aðrar smávegis broytingar verða framdar"* , verður slept, tí har vantar ein nágreining av hvørjar broytingar talan er um.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður galdandi, og at galdandi byggisamtykt fyri Kirkjubø/ Velbastað verður gjørd til serstøk byggisamtykt fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**100/08** **<u>2002-1948</u>**

**<u>Val av limi í nevndina fyri Grunnin Tórsvøll fyri næstu 4 árini</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært viðtøkunum fyri grunnin, skal býráðið velja ein lim í nevndina, sum samstundis er formaður.

Nevndin situr í 4 ár, síðst býráðið valdi lim var í 2002.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at velja Børge B. Hansen í nevndina, sum formaður.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**101/08** **<u>2005-0984</u>**

**<u>Skipan av nýggja heiminum til eldri oman Mattalág</u>.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við skipan av hesum nýggja heiminum til eldri hava samráðingar verið við fyristøðufólkið á Ellis- og umlættingarheiminum, um at heimið verður ein víðkan av búplássunum á Ellisheiminum, soleiðis at raksturin verður so rationellur sum gjørligt.

Kommunan hevur møguleika at keypa ein part av tí innbúgvi, sum er í húsinum, ið eru kvalitetsmøblar við eldri sniði. Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir tað innbúgv, sum er hóskandi til heimið.

Arbeitt verður í løtuni við at kanna, hvørjar ábøtur eru neyðugar, fyri at húsið skal lúka brunakrøv o.a. til eitt heim fyri eldri, og at søkja um stuðul frá Almanna- og heilsumálastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til skipa heimið sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum, sum sostatt verður uppnormerað við 8 búplássum og at søkja Almanna- og heilsumálaráðið um stuðul smbr. løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim.

Eisini verður mælt til at keypa innbúgv og at játta peningin av íløgunum á eldraøkinum. Kostnaður verður lagdur fram á fundinum.

**Sosiala nevndin 7. juli 2005:** Samtykt at taka undir við at heimið verður skipað sum ein partur av Ellis- og umlættingarheiminum.

Nevndin samtykti eisini, at heildarætlan verður gjørd fyri ognina.

**Ískoyti:**
J. P. Gregoriussen, arkitektur, sum upprunaliga teknaði húsini, er saman við umsitingini biðin um at gera eina heildarætlan fyri ognina.

Sambært tekningum, dagfestar 14. august 2005, ber til við smávegis broytingum at fáa pláss fyri 10 búfólkum. Tá er eisini niðasta hædd tikin við, har íbúð verður til eini hjún. Av tí at flestu búrúmini eru á ovastu hædd, verður mett neyðugt, at lyfta verður frá kjallaranum og upp á ovastu hædd.

Uttandura verður gjørd suðurvend terassa og gøta frá úthurð. Skipað verður fyri 4 p-plássum inni á grundøkinum. Starvsfólkini kunnu nýta parkeringsplássið við J. Nolsøesgøtu.

Samlaði kostnaðurin við 6,25% mvg. verður mettur til kr. 1.333.438. Innbúgv við meira verður mett til kr. 500.000,- . Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 1.833.438,- og arbeiðstíðin til 5 mánaðir.

Umsókn um studningslán og játtan til rakstur varð 14. juli 2005 send almanna- og heilsumálaráðnum, sum við skrivi, dagfest 9. august 2005, hevur boðað frá, at parturin av umsóknini, sum snýr seg um rakstur frá 1. januar 2006, verður viðgjørdur saman við løgtingslógaruppskotinum fyri 2006.

Viðvíkjandi umsóknini um studningslán verður sagt, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um í heyst at leggja lógaruppskot fyri løgtingið um eina nýggja verklagslóg til fígging av íløgum til ellis- og røktarheim og sambýli, og at fyriliggjandi umsóknir um studningslán endaliga verða viðgjørdar, tá lógargrundalagið er broytt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitiatión.

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til heildarætlan, og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Av tí at tað í kostnaðarmetingini ikki er tikin hædd fyri møguligum óvæntaðum útreiðslum, verður mælt til at játta 2 mio. kr. til verkætlanina av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevndin 30. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndin, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 31. august 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 15. september 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Lisitatión varð hildin 7. desember, og varð úrslitið:

| | | |
| --- | --- | --- |
| Henning Hansen | kr. | 1.557.540,00 |
| Karstin Vang | - | 1.418.578,00 |
| D. Jacob Magnussen | - | 1.826.132,65 |
| Byggifelagið Articon | - | 1.730.538,00 |

Ráðgevin J. P. Gregoriussen, arkitektur, hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av

lægsta tilboðnum.

Samlaði byggikostnaðurin íroknað lyft, ráðgeving og partar av innbúgvi við 6,25% mvg. verður kr. 1.664.197,00. Eftir til innbúgv og útgerð eru sostatt kr. 335.803,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá ráðgevanum og taka av tilboðnum frá Karstini Vang.

**Sosiala nevnd 12. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

Vísandi til skriv frá Almanna- og heilsumála-ráðnum, dagfest 6. desember 2005, har boðað verður frá, at landsstýrið, grundað á politisku raðfestingina í síni viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006, hevur tikið avgerð um ikki at raðfesta umsóknina viðvíkjandi uppnormering av búplássum á Tórs-havnar Ellis- og umlættingarheimið, samtykti nevndin at biðja um fund við avvarðandi landsstýrismann og formannin í løgtingsins fíggjarnevnd beinanvegin. Málið hevur skund.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd, treytað av, at almanna- heilsumálaráðið veitur stuðul til verkætlanina.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur við skrivi dagfest 24. mai 2006 boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at sýta umsóknini um studningslán til skipan av eldrasambýli í ognini oman Mattalág 5. Hinvegin mælir landsstýrismaðurin Tórshavnar kommunu til at taka upp samband við Heimarøktina, við tí endamáli at finna fram til á hvønn hátt ognin kann skipast sum bráfeingis umlættingarheim, ið verður umsitið av Heimarøktini.

Sum grundgeving verður í skrivinum nevnt, at til tess at tryggja, at húsini eru egnað til eldrabúpláss, hevur Almanna- og heilsumálaráðið havt umsóknina til ummælis hjá Heimarøktini. Víst verður til, at Heimarøktin í ummælisskrivinum ikki kann viðmæla, at húsini kunnu nýtast sum eldrabúpláss, eftir tær ætlaðu umbyggingarnar. Tó verður sagt, at hølini kundu verið egnað sum bráfeingis umlættingarheim til borgarar, sum annars megna at vera í egnum heimi við tænastu frá Heimarøktini. Løgtingslógin um studningslán heimilar tó ikki veiting av stuðli til skipan av umlættingarheimum.
Kommunan hevur fingið freist til 12. juni 2006 at gera viðmerkingar til avgerðina.

Vísandi til fyrisitingarlógina hevur umsitingin biðið Almanna- og heilsumálaráðið um innlit í ummælisskrivið hjá Heimarøktini.

Í ummælisskrivinum frá Heimarøktini verður als ikki nevnt, at húsini í Mattalág ikki

kunnu nýtast til eldrasambýli, eftir tær ætlaðu umbyggingarnar. Í skrivinum verður sagt, at Heimarøktin hevur ta grundleggjandi fatan, at Sambýlir hoyra farnari tíð til. Sambýlir eru ikki tíðarhóskandi eind, hvørki sum partur av Heimarøktini ella sum sjálvstøðug skipan.
Løgtingið samtykti í desember 2005 lóg um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, har tað í § 1 er ásett: *Studningslán úr landskassanum, sum er rentu og avdráttarfrítt, kann verða latið kommunum til keyp, nýbygging ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim ella sambýli.*

Eisini samtykti løgtingið í desember 2005 við lóg at avhenda eldrasambýlið í Kollafirði til Tórshavnar kommunu.

At Heimarøktin hevur ta grundleggjandi fatan, at Sambýlir hoyra eini farnari tíð til, kann tí ikki av landsstýrismanninum brúkast sum grundgeving fyri ikki at játta studningslán til ognina oman Mattalág. Almanna- og heilsumálaráðið er tí biðið um at viðgera umsóknina av nýggjum.

**Sosiala nevnd 13. juni 2006:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Í skrivi dagfest 9. mars 2007 hevur Almanna- og heilsumálaráðið boðað frá, at landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at taka umsókn kommununar um studningslán til eldrasambýlið oman Mattalág upp til nýggja viðgerð. Í hesum sambandi hevur Almanna- og heilsumálaráðið heitt á Nærverkið um at koma við einum nýggjum ummæli.

Í sínum ummælisskrivi vísir Nærverkið á, at á loftshæddini meta tey tað ov lítið, bert at hava eittans w.c og mæla tí til, at tvey búrúm verða løgd saman til ætlaða hjúnarúmið, og at baðirúm við w.c. verður gjørt til hetta búrúmið. Nærverkið mælir tí til, at talan verður um fimm ístaðin fyri seks búrúm á loftshæddini. Eisini mælir Nærverkið til, at dururin við høvuðsinngongdina verður gjørdur eitt sindur størri, um hetta er gjørligt.

Við teimum broytingum, sum mælt verður til, metir Nærverkið annars, at ognin oman Mattalág er egnað til eitt eldrasambýlið til 9 búfólk.

Vísandi til ummælisskrivið frá Nærverkinum og tørvskanning Almanna- og heilsumálaráðsins annars, hevur landsstýrismaðurin gjørt av at veita Tórshavnar kommunu tilsøgn um studningslán til eldrasambýlið áljóðandi kr. 450.000,-, sum svarar til kr. 50.000,- pr. búfólk.

Tilsøgnin er treytað av, at
1 talan er um eina góðkenning í eitt avmarkað tíðarskeið
2 broytingarnar, sum Nærverkið hevur mælt til, verða gjørdar
3 verkætlanin er í tráð við kommunalu byggisamtyktina
4 í minsta lagi eitt umboð fyri Nærverkið verður tilnevnt í bygginevndina

Afturat tilsøgnini um studningslán er eisini ein tilsøgn um, at landið veitir fígging til rakstur av eldrasambýlinum eftir somu treytum, sum til onnur eldrasambýli. Kommununar partur verður rakstur av bygninginum og náttarvaktin.

Í sambandi við at talan er um eina góðkenning í eitt avmarkað tíðarskeið, hevur kommunan mælt til, at góðkenningin fyribils verður galdandi, til verkætlanin yviri við Strond er komin undir land. Um tað tá vísir seg, at tørvurin tá er nøktaður, eigur støða at verða tikin til, um ognin oman Mattalág til ta tíð møguliga kann verða brúkt til annað endamál á eldraøkinum. Hesum hevur landsstýrismaðurin tikið undir við, og í skrivi dagfest 30. mai 2007 boðað frá, at góðkenningin fyribils er galdandi til verkætlanin Yviri við Strond er liðug.

Ráðgevin J.P.Gregoriussen, arkitektur hevur í sambandi við kravdu broytingarnar gjørt nýggja kostnaðarmeting og dagføring av tilboðnum hjá Karstini Vang.

Samlaði kostnaðurin av umbyggingini við 6,25% mvg verður nú mettur til kr. 2.085.418,- Innbúgv og útgerð verður mett til kr. 500.000,- Við frádrátti av játtaða studningsláninum á kr. 450.000,- verður kommununar partur av útreiðslunum sostatt kr. 2.135.418,-.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við avgerðini hjá landsstýrismanninum, og at farið verður undir at umvæla ognina til endamálið. Eisini verður mælt til at taka av dagførda tilboðnum frá Karstini Vang, og at meirkostnaðurin við frádrátti av játtaða studningsláninum ella kr. 150.000,- verður játtaður av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevnd 5. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildarleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nýtt:** Ráðgevin hevur gjørt vart við, at fleiri av vindeygunum - serliga á suðursíðuni - eru illa farin av roti, og tí áttu at verið skift út. Eisini verður víst á, at sambært útbjóðingartilfarinum var ætlanin, at gólvuni og trappan bert skuldu lakkerast. Gólvuni eru úr parkett, og nú veggir eru fluttir og eisini aftaná at frítíðarskúli hevur verið í húsinum, eru tey illa farin og verða ring at halda viðlíka við bert at lakkera tey. Mælt verður til at leggja linoleum á gólvuni og trappuna.

| | |
|---|---|
| Tilboð uppá at skifta vindeygu, gólválegging v.m. | kr. 240.000 |
| Óvæntað og eftirlit | - 36.000 |
| 6,25% mvg | - 17.250 |

Í alt kr. 283.250

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at arbeiðið verður gjørt, og at meirkostnaðurin kr. 283.250,- verður játtaður av íløgum á eldraøkinum.

**Sosiala nevnd 5. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og sosialdeildar-leiðaranum at játta meirkostnaðin, kr. 283.250,00, av teimum 750.000 kr., sum loypa av tí, sum er sett av til verkætlanina fyri uttanumøki við Vallalíð í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**102/08** **2008-1295 - PAP**

**Glyvursvegur 6. byggistig: Fyrispurningur frá Articon P/f um at leingja verandi sáttmálan fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata Glyvursvegur 6. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2007-1458 - Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð - Glyvursvegur 6. byggistig.

P/F Articon hava sett fram fyrispurning, um Tórshavnar kommuna er áhuga í at leingja verandi sáttmála fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata part av Glyvursvegur 6. byggistig. Tað er frá arbeiðstøkumarki fyri Glyvursveg 5. byggistig og suður um útstykkingina á Hamrinum á Argjum. Somu einleikaprísir verða nýttir sum í verandi projekti.

Verður fyrispurningurin gingin á møti, kemur hetta at spara kommununi eitt sindur av tíð.

Articon P/f ger spreingi- og planeringsarbeiðið í sambandi við nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum.

Nú grevstrararbeiðið í sambandi við Glyvursveg 5. byggistig er um at vera liðugt, er møguleiki hjá Articon P/f at halda fram við Glyvursvegur 6. byggistig við tað sama. Eisini er munandi læsttari at planleggja arbeiðini, tá tað er sami arbeiðstakari. Her verður

eisini hugsað um grótjavnvág. Meiningin er eisini at nýta grót frá skúlanum á Argjum til vegaføringarnar.

Fyritreytirnar viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum við Búnaðarstovuna mugu fáast í rættlag, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur í løtuni einki detailprojekt av 6. stigi, og tí er trupult at meta um samlaða kostnaðin fyri verkætlanini. Leystliga mett kemur arbeiðið at kosta uml. 10-12 mió. kr. Strekkið, talan er um, er uml. 450 m.

Onki avsett á fíggjarætlanini fyri 2008 til 6. byggistig, men hinvegin eru avsettar kr. 7,5 mió. til prosjektering av brúgv um Sandá, sum er Glyvursvegur 4. stig. Tað verður tó ikki komið so langt við hesum arbeiði í 2008 sum upprunaliga ætlað. Sama ger seg galdandi fyri aðrar íløgur, ið eru ætlaðar at verða gjørdar í 2008. Tí metir tekniska umsitingin, at tað er møguligt at gera nakrar umraðfestingar innan íløgurnar fyri 2008, við tí fyri eyga at halda fram við arbeiðinum av Glyvursvegnum 6. stig.

Á hesum grundarlagi mælir tekniska umsitingin til at umraðfesta íløgurnar og flyta játtan til Glyvursveg 6. stig soleiðis:

| Konto | Verkætlan | Broyting 2008 | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| | Fígging til Glyvursvegur 6. stig | | |
| 11871 | Glyvursvegur 6. stig | 150.000 | restjáttan frá 2007 ella fyrr |
| 11868 | *at flyta frá brúgv um Sandá | 5.000.000 | er viðmælt av bygginevndini á fundi 07.05.08 |
| 11822 | *at flyta frá Glyvursvegur | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11841 | *at flyta frá Reynsgøtu | 400.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11848 | *at flyta frá gongubreyt við Vegin Langa | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11863 | *at flyta frá ferðslutrygd v. Hoyvíkar skúla | 370.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11889 | *at flyta frá vegagerð á Dánjalstrøð | 2.000.000 | játtan frá 2007 |
| 11875 | *at flyta frá vegur, kloakk o.a. á útstykking á Argjum hjá V. Dalsgaard (komm. partur) | 3.330.000 | játtan frá 2008 |
| | **Tilsamans** | **11.850.000** | |

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. at arbeiða fram ímóti at gera eina avtalu við P/F Articon um kostnað og tíðarætlan fyri leingjan av Glyvursvegi til verandi íbinding til útstykkingina á Hamrinum
2. at játta kr. 11,7 mió. til konto 1011-90-11871 við flytingum, sambært omanfyri standandi yvirliti.
3. at heita á umsitingina fyri keyp og sølu um beinanvegin at gera avtalu við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti Høgni Mikkelsen tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**103/08** **2008-1294 – PAP (víst verður eisini til j. nr. 2005-2344)**

**Nevndarsamtykt: Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi

1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekterings-arbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

**104/08** **<u>2006-1241 KF</u>**

**<u>Keyp/bygging av hølum til umsitingina</u>.**

Stjórnin vísir á, at kommunan og kommunalu uppgávurnar vaksa í stórum og mælir tí til, at fleiri umsitingarhøli verða útvegað sum skjótast.

Mælt verður til at loysa hølistrupulleikan í stigum soleiðis:

1. stig: Kommunan keypir bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthers-gøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mió. kr.
2. stig: Farið verður beinan vegin undir bygging av skrivstovubygningi/býráðssali á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin eru.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum og at fíggja keypið sum útlegg.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Fyrst varð atkvøtt um at at keypa bygningin hjá Petur & Petur á horninum N. Winthersgøtu/Magnus Heinasonargøtu fyri 3,5 mió. kr., ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð varð atkvøtt um at fara undir kanning av møguleikunum fyri at byggja skrivstovubygning/býráðssal, ið tekur seg væl út á ognini, har p-plássið og sølubúðirnar millum Hotell Tórshavn/Sjómansheimið og gl. Posthúsbygningin, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti**:
Hølisviðurskiftini til umsitingina hjá býráðnum hava verið viðgjørd í samband við ymisk mál. Vísast kann til jr. Nr. 2007-0100 og 2008-0194.

Hesi mál hava gjøgnumgangandi snúð seg um fyribilsloysnir, og úrslitið av hesum er, at fyrisiting kommununar er spjadd ymsastaðni kring miðbýin og at kommunan hevur keypt fleiri smærri bygningar til hesar fyribilsloysnir.

Tað eru fleiri sjónarmið ið tala fyri at fáa savnað fyrisiting kommununar á einum stað:

- Starvsfólkatrivnaðurin verður munandi betur
- Meira rationell og vælvirkandi umsiting
- Meira rationellur rakstur
- Dupultfunktiónir kunnu beinast burtur

Vísandi til innanhýsis tekniskt notat j. nr. 2007-0100/7, eru nevndir 6 ymsir møguleikar fyri loysnum. Í niðurstøðuni verður víst á serliga 2 møguleikar, har tann fyrri er at byggja út á økinum millum Posthúsið og Hotel Tórshavn í 5 hæddum. Við hesi útbygging kunnu útvegast uml. 3000 m2 afturat á hesum økinum, afturat verandi fyrisitingarhølum í Posthúsbygninginum, í Ráðhúsinum og Býráðssalinum. Á henda hátt kunnu útvegast pláss til uml. 120 starvsfólk.

Vísandi til prosjektið um bókasavn á hesum økið, sum varð teknað fyri nøkrum árum síðani, ber til at byggja her uttan at fáa meira skugga á Vaglinum enn í dag.

Hin seinni møguleikin sum í niðurstøðuni í nevnda notatið er nevndur sum ein annar góður møguleiki, sum er at byggja nýtt á grundøkinum beint eystanfyri Norðurlandahúsinum, sum kommunan eigur. Økið er knappliga 10.000 fermetrar til víddar. Økið er sum nú er lagt út sum C2-økið, Opin miðstaðarbygging. Økið er vælegnað, og í grannalagnum eru størri bygningar – t.e. Norðurlandahúsið, Útvarpshúsið umframt bygningarnir á ítróttarøkinum í Gundadali. Við at broyta økið til t.d. C3-økið ber til at byggja uml. 5000 fermetrar á økinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til, at býráðið tekur avgerð um ein av teim nógvu møguleikum at savna umsitingina á einum stað, sum víst er á í málunum, ið hava verið fyri um hølisviðurskiftini, og at játta kr. 800.000 av íløgum fyri 2008, at fyrireika eina byggi- og kappingarskrá, og at útskriva kapping um at gera prosjekt til eina endaliga loysn.

**Býráðið 30. januar 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Heðin Mortensen, um at beina málið í byggi og býarskipanarnevndini fyri at finna eina hóskandi staðseting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Samtykt at heita á umsitingina at koma við uppskoti til staðseting.

**-Ískoyti:**
Umsitingin hevur hugt eftir líknandi verkætlaninum við umsitingarbygningum til kommunur í Danmark. Hesar verkætlanir, ið eru nýggjar, vísa at bruttofermetra tørvurin er frá undir 20 ferm/starvsfólk í Hillerød til umleið 30 ferm/starvsfólk í Middelfart. Viborg 22,5 ferm/starvsfólk. Assens 25 ferm/starvsfólk. Skive 27,5 ferm/starvsfólk. Middelfart hevur 30 ferm/stravsfólk.Tá verður mett at verða gott pláss. Við einum miðalferðmetratali upp á 25 fyri hvørt starvsfólk og við einum mettum starvsfólkatali á 150 fyri Tórshavnar kommunu, verður bruttostøddin 3750 fermetrar.

<u>Økið eystanfyri Norðurlandahúsið:</u>
Umsitingin hevur mett um ymsar staðsetingar – bæði tær sum umrøddar eru í innanhýsis tekniska notatinum j. nr. 2007-0100/7, og aðrir møguleikar. Á hesum grundarlagi er gjørd ein meting av ymsu møguleikunum og ein niðurstøða um eina ávísa staðseting at arbeiða víðari við, sambært samtykt í býráðnum hin 4. feb. 2008.

Við Norðara Ringveg, millum rundkoyringina til Sundsveg og Norðurlandahúsið verður mett at verða góð staðseting. Økið liggur miðskeiðis í býnum og tætt við góðar møguleikar at koma og fara við bussi, bili, súkklu og til gongu. Økið er C2 miðstaðarøki og er tilsamans áleið 10.000 fermetrar.

Í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið hjá Norðurlandahúsinum lat kommunan eitt friðingarbræv, sum tryggjar at slættin millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin skal liggja sum eitt fríøki, ið kommunan og húsið í felag ráða yvir. Hetta bleiv so tinglisið

sum servituttur á ognirnar matr. nr. 1453a, 1409 og 1410d, sum Tórshavnar kommuna og Norðurlandahúsið í felag hava átalurætt til. Hetta ger, at økið ikki kann byggjast, so leingi servitutturin er galdandi.(Journ.nr. 37.6 1993).

**Tilmæli:**
Býarskipanardeildin metir at ognin millum Sundsveg og Norðurlandahúsið er besta staðseting av nýggjum umsitingarbygningi til kommununa.

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at kommunan tekur upp samráðingar við Norðurlandahúsið fyri at avlýsa friðingina av ognini millum Sundsveg og Norðurlandahúsið.

Somuleiðis mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at býráðið fyribils játtar kr. 800.000 av íløgum fyri 2008, at fyrireika eina byggi- og kappingarskrá, og at útskriva eina arkitektakapping um at gera prosjekt til eina endaliga loysn, beinanvegin eftir at avtala er gjørd við Norðurlandahúsið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini at staðseta nýggjan umsitingarbygning til kommununa millum Sundsvegin og Norðurlandahúsið og at taka samráðingar upp við Norðurlandahúsið.

**Býráðið 26. mai 2008:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Jógvan Arge um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**105/08** **2008-0979**

**Umsókn til Búnaðarstovuna um keyp av lendi til veg úr Dánjalstrøð og útstykking til grundøkir, matr. nr. 1176, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Víst verður til heildarætlanina fyri ognirnar frá Marknagilsá til Kongsgil, sí j. nr. 2004-1071. Í hesum sambandi skal vegur gerast frá Dánjalstrøð og eystur ímóti matr. nr. 1215a, sí plantekning j. nr. 2004-1071/29.

Ætlanin er eisini at útstykkja nøkur grundøkir fram við vegnum.

Fyri at kunna gera veg og útstykkja, er neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at ogna sær lendi, matr. nr. 1176, Tórshavn. Tað er umleið 5.776 m2.

Umsitingin hevur gjørt eina tekning, sí TK j. nr. 2008-0979/1.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at Tórshavnar kommuna søkir Búnaðarstovuna um loyvi at ogna sær lendið, matr. nr. 1176, Tórshavn, umleið 5.776 m2.

Umboð fyri teknisku deild kemur á fundin at greiða frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjað av útstykking á Dánjalstrøð.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**106/08** **2004-1434 SG**

**Fyrspurningur frá felag um møguleikarnar fyri at fremja eina ætlan um at byggja neyst í einum parti av grótbrotinum norðanfyri SEV-verkið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá umsøkjara um at fáa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið) avlagt til p/f Sundsneystini til neystabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina skipanarætlan fyri økið og lýsing av atkomumøguleikunum og at boða umsøkjaranum frá hesum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin hevur um telefonina havt samband við stovnararnar av p.f. Sundsneystunum og eftirlýst

1) umsókn um at keypa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið)
2) skipanarætlan fyri økið
3) lýsing av atkomumøguleikunum.

ad 1) Beinleiðis umsókn er ikki send kommununi, men teir vísa til teldubræv frá 30. juni 2005.

ad 2) skipanarætlan er ikki latin kommununi, men teir hava eina ávegis skipanarætlan at lata.
ad 3) Sum ad 2.

Kommunan hevur fyri tíð síðani keypt lendið (grótbrotið), matr. nr. 4c, Sunds bygd, fyri kr. 262.250,05, sbrt. skeyti frá 14. juli 2005 við treytum.

Búnaðarstovan upplýsir, at kommunan herumframt hevur rindað eitt sindur meira fyri lendið, síðani tað var keypt fyri tíð síðani.

Herumframt hevur kommunan rindað fyri tinglestur og matrikulering.

Í sambandi við málsviðgerðina verður víst til umfarskriv, dagfest 27. oktober 1961, frá Føroya landsstýri til Tórshavnar kommunu og øll kommunustýrini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at leiga sp/f Sundsneyst, matr nr. 4c, Sunds bygd, stødd 30.853 ferm., í 40 ár við rætti til framleingjan og fyri vanligan prís sum óbyggibúgvið havnaøki treytað av loyvi landsstýrisins og treytað av, at bygt verður innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, í prinsippinum, at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr.nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 ferm., til neystabygging og tilhoyrandi virksemi í 50 ár við rætti til framleingjan.

Leigan verður samsvarandi leigu av 3 traðum, t.v.s. kr. 3.000 pr. ár. Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílik bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvi fæst frá landsstýrinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen hevur ynskt málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Steðgað verður við avgreiðsluni av málinum, meðan heilsu & umhvørvisdeildin arbeiðir við at kanna møguleikan fyri økjum til tyrving.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2007:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini 13. september 2006.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal metir ikki at málið er búgvið at fara fyri býráðið vísandi til, at samtyktin í byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. juli 2005, enn ikki er fylgd og mælir til at koyra málið aftur í umsitingina.

**Fíggjarnevndin 26. mars 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 28. mars 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at taka undir við tilmælinum hjá hjá borgarstjóranum um, í prinsippinum at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr. nr. 4c, Sundsbygd, stødd 30.853 fermetrar til neystabygging og tilhoyrandi virksemi.

Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílík bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvið fæst frá landsstýrinum.

**Ískoyti:**
Innlendismálaráðið hevur í brævi dagfest 24. september 2007 heimilað Tórshavnar kommunu at leiga Sundsneystini Sp/f matr. nr. 4c, Sundsbygd, í 50 ár.

Mett verður ikki, at ætlanirnar hjá felagnum Sundsneystini Sp/f samsvara við byggisamtyktina fyri økið, og arbeitt verður tí við at broyta byggisamtyktina fyri økið, so hon samsvarar við ætlanirnar at byggja neyst o.a. á økinum.

Økið, talan er um, liggur í umráðispartinum B9, ið *verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur. Herumframt verður økið tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum.*

Ætlanin er at broyta byggisamtyktina fyri økið, so økið kemur at liggja í umráðispartinum E, ið verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi.

Ásetingarnar fyri umráðispart E í 3. grundumráði verða soljóðandi:

*Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, t.e. bátahyl, neystabygging, útipláss til smábátar, kappróðrarfeløg o.t. og virksemi, sum hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t.*

*Skipan og bygging á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

Støða skal tí takast til fyriliggjandi fyribils leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f, ið er treytaður av, at byggisamtyktin seinni verður broytt og góðkend av Innlendismálaráðnum. Endaligur leigusáttmáli verður gjørdur millum partarnar, tá Innlendismálaráðið hevur góðkent broyttu byggysamtyktina.

**Tilmæli:**
Kommustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at viðmæla fyribils, treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Býráðið 11. oktober 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til ískoytið omanfyri, uppskotið til leigusáttmála j.nr. 2004-1434/62, notat í málinum j.nr. 2004-1434/63 verður fíggjarnevndin biðin um at taka støðu til fyriliggjandi fyribils, treytaða leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at viðmæla treytaða leigusáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Sundsneystini Sp/f og leggja hann fyri býráðið til endaliga góðkenning umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Mælt verður fíggjarnevndini til at treyta góðkenningina av, at umsøkjarin letur inn nýtslu-/byggiætlan og tíðarætlan fyri byggingina til nevndina til endaliga góðkenning.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, umvegin byggi- og býarskipanarnevndina, til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. mai 2008:** Málið útsett.

**Býráðið 26. mai 2008:** Málið útsett.

**107/08** <u>**2008-1424**</u>

<u>**Broyting í reglugerð fyri grundstykkir**</u>

**Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av**
**fastari ogn til egnan privatan bústað**

Verandi áseting í § 11, stk. 3:

*“Føstu ognirnar, sum eingin keypari er til, verða bjóðaðar teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ikki áður hava fingið bjóðað fasta ogn í tí útstykkingini. Tygum fáa sostatt ikki fleiri tilboð í somu útstykking.”*

Broytingaruppskot til § 11, stk. 3:

*"Føstu ognirnar, sum eingin keypari er til, verða bjóðaðar teimum, sum standa fremst á bíðilistanum, og sum ikki áður hava fingið bjóðað fasta ogn í tí útbjóðingarumfarinum."*

Viðmerkingar til broytingaruppskotið:

Mælt verður til, at ásetingin í § 11, stk. 3 í "Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað", sum var samtykt á býráðsfundi tann 28. mars 2007 verður broytt.

Umsitingin er komin eftir, at ásetingin í § 11, pkt. 3 ikki er heilt í tráð við galdandi praksis og ikki í tráð við tað, sum ætlanin var í samband við útlutan av fastari ogn.

Meginreglan í sambandi við útlutan av fastari ogn eftir galdandi reglugerð er, at umsøkjarar, sum lúka treytirnar fyri tillutan, fáa tillutað fasta ogn í raðfylgju eftir dagfesting, tá umsóknarblaðið varð móttikið á býráðnum.

Umsøkjarin, sum fyrst er komin á listan fær fyrst bjóðað fasta ogn.

Sambært galdandi áseting í § 11, stk. 3 fáa teir umsøkjarar, sum áður hava fingið bjóðað fasta ogn, ikki fleiri tilboð úr somu útstykking.

Ætlanin við ásetingini var, at umsitingin í samband við útlutan av fastari ogn í einari útstykking, skuldi kunna fara víðari niður eftir listanum, tá teir fremstu umsøkjararnir á bíðilistanum høvdu takkað nei til fasta ogn.

Endamálið var at fáa eina skjóta og smidliga mannagongd í samband við útlutan.

Sum ásetingin er orðað, er heimild ikki fyri, at føst ogn úr somu útstykking kann verða boðin teimum fremstu umsøkjarunum á bíðilistanum meiri enn einaferð.

Umsitingin hevur mett tað vera rímuligt, at fremstu umsøkjararnir á bíðilistanum fáa fasta ogn frá somu útstykking bodna í teimum førum, har long tíð er liðin síðani seinastu útbjóðing.

Serliga kann long tíð vera liðin, tá verður latin inn aftur, ella kommunan hevur kravt ognarrættin til eina fasta ogn aftur, og sum tí seinni skal útlutast av nýggjum.

Umstøðurnar hjá umsøkjarunum á bíðilistanum mugu metast at verða broyttar, tá ið ein ávís tíð er fráliðin. Tískil verður skotið upp, at tað ístaðin fyri at standa "somu útstykking" kemur at standa "útbjóðingarumfar" í § 11, stk. 3.

"Útbjóðingarumfar" er at skilja sum útbjóðing, sum fer fram leypandi yvir eitt samanhangandi tíðarskeið.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta reglugerðina.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**108/08** **2008-0390**

**Roknskapur 2007 hjá Tórshavnar kommunu.**

Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av, at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til roknskapin.

**Býráðið 26. mai 2008:** Einmælt samtykt.

**109/08** **2008-1428**

**Grannskoðanarfrágreiðing 2007 hjá Tórshavnar kommunu**

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Framløgd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Framløgd.

**110/08** **2008-1320**

**Roknskapur 2007 hjá Tórshavnar havn**

Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av, at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Útsett.

**Havnarnevndin 19. mai 2008:** Roknskapurin góðkendur. Samtykt at mæl býráðnum til, um fíggjarnevndina, at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við uppskotinum til roknskapin.

**Býráðið 26. mai 2008:** Einmælt samtykt.

**111/08** **2008-1321**

**Grannskoðanarfrágreiðing 2007 hjá Tórshavnar havn**

**Havnarnevndin 19. mai 2008:** Framløgd.

Samtykt at leggja grannskoðarafrágreiðingina fyri býráðið og fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Framløgd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Framløgd.

**112/08** **2008-1431**

**Val av grannskoðara**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
§ 46 í kommunustýrislógini. Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. *Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til aftur at velja Spekt.

**Býráðið 26. mai 2008:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Inga Dahl | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Annfinn Brekkstein | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |